## VIÐMERKINGAR

# Soleiðis kann rytmiskur tónleikur eisini vera

**Ólavur Hátún**



Ikki vóru nógv fólk møtt til konsertina hjá bólkinum "A KIND of B....Quartet" í Norðurlandahúsinum seinasta leygardag, og tað var spell, tí vit, sum vóru har, fingu eina ógloymandi tónleikuppliving. Ikki tí, her var ikki talan um Bach, Mozart, Brahms og teir, sum liggja mínum hjarta næstir, men um rytmiskan tónleik hallandi mest til jazzin

Framførslurnar vóru tó so heilt øðrvísi, enn ljóðførissamansetingin elguitar, el-bass, ljómborð og slagverk vanliga býðir til. Onki niðrandi skal sigast um tann tónleikaliga ovurhuga og tey ógvisligu orkutøk, sum á okkara tónleikapøllum eins og eisini aðrastaðni fáa ungdómsligar áhoyrarafjøldir upp at darta og sveiggja og skapa eina felags kenslu og tilvitan, ið eisini hevur varandi virði. Ivaleyst hava tær ungu genturnar í Fuglafirði, sum Sosialurin endurgav so negativt um teirra uppliving av kvartettini, væntað sær slíka eggjandi løtu, har tónleikurin í sjálvum sær ofta kann vera heldur lættisoppakendur. Men teir fýra ungu spælimenninir Leo úr Argentina, Marco úr Napoli, Frederico úr Venezia og Bjarki úr Havn, ið hava lisið saman á heimsgitna tónlistarsetrinum Berklee College of Music í Boston, eru komnir longur enn til at hava tað sum eitt høvuðsendamál við sínum spæli at fáa salin upp at kóka. Hjá mær, sum fekk tvey høvi til at fáa latið upp fyri hesum mær so fremmanda tónleikaheimi, gekkst tað so, at eg sum frá leið gjørdist meira og meira hugtikin av hesum sublima, impressionistiska samanspæli.

Ofta var tað so, at elbassurin - stillisliga, so tú neyvan varnaðist, at hann var byrjaður - legði støðið. Ljómborðið kundi so bera fram ein lagastubba, handfara hann eina løtu og síðan lata hann yvir til el-guitarin, sum sat til reiðar at lofta og spinna víðari. Slagverkið tók undir, og meðan temaið nú ferðaðist frá ljóðføri til ljóðføri, stuðlað av viðkvæmum fylgispæli frá hinum, mentist heildin, dynamiskt skiftandi frá einum pianissimo og upp til eitt munandi forte. Eins og við virðiligari føroyskari kvøðing ella einari fuga hjá J.S.Bach vórðu vit lurtandi meira og meira drigin við í hesum so væl samansjóðaða tónleikatoymi.

Bygnaðurin var ymiskur frá ferð til ferð, og eisini upplivdi tú beinleiðis improvisatión, har musikarnir vakið og neyvt góvu gætur hvør eftir øðrum; men aðaleyðkenni var eitt tónlistarligt støði, hvørs fortreytir umframt viðføddar gávur eru hollur teoretiskur kunnleiki, fullkønur spæliførleiki, listarligur disiplinur og eitt opið skapandi sinni. Vegurin til slíkt støði er áralangt slit á hægri læristovni, tí tónlistargávurnar eru bara fyrsta fortreytin.

Væl hevði eg unnað fleiri av okkara evnaríku rytmisku tónleikarum at verið við og vunnið sær íblástur hesa minniligu tónleikaløtuna í Norðurlandahúsinum, hoyrt Leo pianistin, "one of the most talented guy at Berklee", fara sum hvirluvindur eftir tangentunum, og tónaskaldið Frederico, hvørs kensluborni tónleikur og fjøltáttaða guitarspæl hugtók okkum, hoyrt, hvussu Bjarki, fyrr eitt navn í okkara popptónleikaheimi, nú hevur ment seg til búnan tónlistamann við munandi breiðari spektrum, og seinast og ikki minst eygleitt Marco, sum handfór sítt slagverk so meistarliga og so fjølbroytt, sum eg ikki havi upplivað tað áður. Vónandi verður høvi at hoyra hesar tónleikasnillingar aftur á okkara leiðum. Slíkt høvi kundi verið Listastevnan eitt komandi ár, har listarliga dygdin jú verður sett í hásæti.

# Hjálp til Beate

**Heðin Mortensen**
*Borgarstjóri*



Beate L. Samuelsen vísir enn einaferð sítt manglandi innlit í arbeiðið í býráðnum í greinini "Høgakai og Lágakai eru ikki eftir bókini". Hóast vantandi hugin hjá Beate at seta seg inn í málini, og vaksandi hugin at flyta býráðsarbeiðið í fjølmiðlarnar, vil eg fegin hjálpa við at lýsa málsgongdina.

### Høgakai og Lágakai

Tórshavnar kommuna hevur gjørt eina ætlan um ábøtur fyri økið kring Lágukai, Høgukai og Müllers Pakkhús. Her er talan um fríðkan av økinum, um at gera tað gangandi hjá illa gongdum og um at knýta verandi gongubreyt við bátabrúgvarnar í Vágsbotni saman við Lágukai. Hetta síðsta arbeiðið er farið í gongd og verður goldið av rakstarkontoini hjá Tórshavnar Havn við kr. 800.000. Arbeiðið er í høvuðsheitinum av tílíkum slag, at tað verður bólkað undir umvælingar og rakstur, tí hevur umsitingin mett, at eingin orsøk er til at viðgera tað politiskt.

Restin av arbeiðinum skal fíggjast av Tórshavnar býráð. Á íløguætlanini fyri 2005 eru pengar avsettir til endamálið, so tað er ikki rætt, tá Beate sigur, at málið ikki hevur fingið politiska viðgerð í býráðnum.

Havnanevndarformaðurin hevur vegna nevndina boðað Tórshavnar Havn frá, at peningurin kann brúkast til umvælingararbeiðið. Havnanevndarlimirnir eru skrivliga kunnaðir um ætlanina, ikki bert munnliga, sum Beate vil verða við.

Hin parturin, sum nú skal farast undir, stendur Tórshavnar kommuna fyri. Hetta hevur verið til viðgerðar í byggi- og býarskipanarnevndini 2. mai 2005, fíggjarnevndini 18. mai 2005 og býráðnum 26. mai 2005, har samtykt varð at játta kr. 800.000 til endamálið.

### Posthúsbýgningurin

Arbeiðið við at seta posthúsbygningin í stand, byrjaði í 1999. Arbeiðið skuldi fevna um fyrisitingarhøli, skjalagoymslu og starvsfólkamatstovu í kjallaranum. Farið var undir ar-beiðið, men avrátt varð ávegis at bíða við skjalagoymsluni og starvsfólkamatstovuni.

Seinni hevur so verið arbeitt víðari við at betra um umstøðurnar hjá skjalagoymsluni, somuleiðis sum starvsfólkainngongdin, goymslurúm og hølir til húsavørðarnar eru gjørd. Arbeiðið, sum nú er eftir, er sostatt at gera høli til starvsfólkamatstovu líðugt og endaliga avgreiða umstøðurnar hjá skjalagoymsluni. Arbeiðið hevur higartil verið fíggjað av viðlíkahaldskontoini hjá húsaumsitingini.

Ætlanin er, at hølini skulu kunna nýtast til onnur endamál, umframt at virka sum starvsfólkamatstova, eitt nú matstovuvirksemi uttanfyri arbeiðstíð hjá Tórshavnar kommunu. Sostatt kann bygningurin gerast eitt ískoyti til "mentunargøtuna", sum kommunan vil gera í Tórsgøtu. Fyri at røkka tí støði, sum ein tílík matstova krevur, er tørvur á, at kr. 900.000 verða játtaðar afturat til arbeiðið.

Arbeiðið er byrjað á heysti 2004 og víðkað í byrjanini av februar mánað 2005 til eisini at fevna um starvsfólkamatstovu. Viðmerkjast kann, at hetta var, meðan Beate sat í samgongu. Verkætlanin er viðgjørd politiskt yvir eitt longri tíðarskeið, við byrjan heilt afturi í 1999, tá verkætlanin varð gjørd.

Býráðsumsitingin hevur heitt á Guttesen og Staksberg um at gera seinasta part av arbeiðinum. Guttesen og Staksberg hava gjørt fyrru umbyggingina lidna og kenna sostatt bygningin og umstøðurnar. Vit hava gjørt hetta fyri at spara tíð og pening.

Vónandi kann henda lýsing av hesum málum greiða nakrar av teimum spurningum, sum Beate sat við.

Føroyar í 2015

# Føroyar sum útbúgvingardepil innan sjóvinnu

**Bill Justinussen,**
*løgtingsmaður fyri Miðflokkin*



At leggja eina politiska ætlan fyri komandi 10 árini er eitt skilagott stig, sum Føroya løgmaður hevur tikið. Politikkur snýr seg m.a. um at síggja frameftir og at fyrireika seg til avbjóðingar, sum enn ikki eru komnar undan kavi. Neyðugt er at hava visiónir fyri framtíðina, tí uttan visiónir doyr fólkið, sigur Salomon í orðtøkum sínum.

Miðflokkurin tekur hesa ætlan sum eina positiva avbjóðing. Vit vilja positivt samstarva um á politiskum støði at fyrireika okkara samfelag til framtíðina. Eg fari í nøkrum lesarabrøvum at vísa á nakrar gongdar leiðir fyri okkara samfelag.

### Hvat duga føroyingar

Eg haldi, at føroyingar í alt ov lítlan mun hava dyrkað okkara sterku síður sum fólk. Vit eru ein sjóvinnutjóð, og okkara sterkasta síða er uttan iva, at vit útbúgva og eiga millum heimsins bestu sjómenn. Á øllum heimshøvunum sigla teir umborð á skipum úr mongum tjóðum, og hava teir gott orð á sær allar staðir. Útbúgvingin, sum teir kunnu nema sær í okkara egna landi, er høvuðsgrundarlagið undir hesum veruleika, og hon røkkur til allar uppgávur, sum finnast í sjóvinnuni.

### Føroyar útbúgvingardepil

Og júst á útbúgvingingarøkinum eiga vit føroyingar at selja okkum munandi betri. Hví ikki gera Føroyar til ein útbúgvingardepil fyri sjófólk, so tey kunnu koma frá nær og fjar til land okkara at nema sær sjóvinnuútbúgving. Hví er tað bara náttúrligt fyri okkum føroyingar at fara aðrastaðir at fáa útbúgving, meðan tað tykist trupult at fáa onnur hendavegin? Hetta er ein avbjóðing, sum landsstýrið eigur at taka í størsta álvara og kann uttan iva gerast eitt annað bein at standa á. Vit føroyingar duga at fiska, vit duga at manna skipini og at útbúgva sjófólkið. Lat-ið okkum selja hesa vitan og fáa okkum vinning úr hesum møguleikum.

Tað snýr seg um at selja "know how". Hvussu nógv hava føroyingar fingið burturúr at givið okkara vitan burtur eitt nú innan rækjuvinnuna, nótavinnuna og flakavinnuna? Hvussu nógvir føroyingar hava ferðast kring heimin og hildið skeið og fingið inntøkur til landið tann vegin? Og so kunnu vit spyrja hinvegin. Hvussu nógvir t.d. norðmenn hava ókeypis givið okkum ráð og vegleiðing innan eitt nú alivinnuna? Og hvussu nógvir danir eru ikki her árið runt og selja okkum skeið innanfyri nærum øll lívsins viðurskifti? "Know how" er ein søluvøra, sum fólk vilja geva høgan prís fyri. Her eru ótroyttir møguleikar fyri okkum føroyingar, serliga innan sjóvinnuútbúgvingarøkið.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.